# Ársaðalfundur
## í P/F Suðuroyar Sparikassa

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Boðað verður við hesum til ársaðalfundar í P/F Suðuroyar Sparikassa mánadagin 22. mars 2021 kl. 16.00 á høvuðsskrivstovuni hjá P/F Suðuroyar Sparikassa, Vágsvegur 60, Vágur.

**Dagsskrá**

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í farna ári.
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar.
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti sambært góðkenda roknskapinum.
4. Fráboðan frá Suðuroyargrunninum viðvíkjandi rætti grunsins at tilnevna ein nevndarlim sambært § 14.
   *Suðuroyargrunnurin hevur boðað frá, at hann fer at tilnevna Dennis Holm, samfelagsfrøðingur, námslektari á Setrinum, Bøgøta 27, 900 Vágur, sum nevndarlim.*
5. Val av nevndarlimi.
   *Gudfinn Olsen stendur fyri vali sambært § 14, stk. 2, og § 21, stk. 4 í viðtøkunum. Gudfinn Olsen ynskir ikki afturval. Nevndin mælir til, at Helga á Borg, advokatur, Leitisgøta 18, 160 Argir, verður vald.*
6. Val av grannskoðan.
   *Nevndin mælir til afturval av verandi uttanhýsis grannskoðara, Sp/f NUMO, góðkent grannskoðanarvirki.*
7. Uppskot frá nevndini:

   Nevndarsamsýning 2021:
   Nevndin mælir til, at samsýningin til nevndarlimir felagsins verður óbroytt galdandi fyri 2021 soleiðis, at aðalfundurin viðtekur at samsýningin til nevndarlimir felagsins fyri 2021 verður latin samsvarandi samsýningarpolitikki felagsins frá apríl 2013, við støði í hesum:

   *Grundsamsýning: 50.000 kr.*
   *Nevndarformaður: 2 x grundsamsýning*
   *Næstformaður: 1,5 x grundsamsýning*
   *Aðrir nevndarlimir: 1 x grundsamsýning*

   *Fyri eykaarbeiði, í grannskoðanarbólkinum ella serligar nógvar nevndarfundir, kann veitast ein eykasamsýning.*
8. Ymiskt

   Fyri at hava rætt til at møta á aðalfundinum skulu partaeigarar, fólk við fulltrú og umboð fyri fjølmiðlar í seinasta lagi hósdagin 18. mars 2021 hava boðað felagnum frá luttøku á deildum felagsins í Vági ella í Tórshavn.

   Rætturin hjá einstøku partaeigarum felagsins til at luttaka á aðalfundinum og at greiða atkvøðu verður ásettur í mun til tey partabrøv, sum viðkomandi partaeigarar eiga mánadagin 15. mars 2021.

   Um so er, at tygum ikki kunnu luttaka á aðalfundinum, hava tygum møguleika at geva skrivliga fulltrú. Fulltrúarskjal er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins.

   Skjal at nýta í samband við møguliga brævatkvøðu er at finna á www.ss.fo og í deildum felagsins. Um so er, at tygum ynskja at geva brævatkvøðu skal brævatkvøðuskjalið vera móttikið á høvuðsskrivstovu felagsins í seinasta lagi mánadagin 22. mars 2021 kl. 13.00.

   Grannskoðaða ársfrásøgnin kemur saman við dagsskrá við fullfíggjaðum uppskotum at liggja frammi á høvuðsskrivstovu felagsins í Vági í seinasta lagi 2 vikur fyri aðalfundin.

P/F Suðuroyar Sparikassi
Nevndin

ANNIJANNI